# MASKINMEISTARIN

Nr. 14 / Juni 2021



## Atli Jensen farin

# Maskinmeistara-bossur í sløk 30 ár



## Sundsverkið kann føða alt meginøkið



## Tummas Eli nývaldur í nevndina



## 18 maskinistar fingu prógv

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
Vanliga eru fýra útgávur um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda Maskinmeistaran, kunnu boða frá hesum í telduposti til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið;

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
Atli Jensen, Grækaris D. Magnussen
Sundsverkið, Øssur Winthereig
Tummas Eli Høj Joensen, Ingolf S. Olsen
Prógvhandan, Maria Lava Jacobsen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
502022

**Prent og liðugtgerð**
Føroyaprent
info@foroyaprent.fo
314555

Upplag: 800

# INNIHALD

Oddagrein..........3
Maskinmeistarabossur í sløk 30 ár..........4
Sáttmálafriður eina løtu..........12
Nýggj nevnd mannað..........16
Samlagstryggingin: Limir detta niður ímillum..........18
Minningarorð um Atla Jensen..........19
18 maskinistar fingu prógv..........20
Maskinistarnir vóru fyrstir..........21
Greinakapping – takið pennin..........22
Formaðurin ávarar ímóti privatisering av SEV..........23
Sundsverkið kann føða alt meginøkið..........24
Tíðindi..........34
Føðingardagar..........35

# Ansið eftir tryggingarstøðuni



Vit eiga sjálvandi ikki alla tíðina at ganga runt og hugsa um vanlukku og sjúkur og alt tað allarringasta, ið henda kann okkum. Men kortini er tað skilagott at vissa seg um, at ein hevur gjørt tað, ið gerast kann, at tryggja seg og síni, um nú lagnan kortini vísti seg frá síni óvinaligu síðu.

Tíverri er tað tó so, at tað ofta ikki verður gáað um hesi viðurskifti, fyrr enn ein knappliga hevur brúk fyri hjálp.

Her hugsi eg serliga um samlagstryggingina, sum Maskinmeistarafelagið vegna allar sínar limir hevur avtalu við tyggingarfelagið LÍV um. Samlagstryggingin tryggjar okkum við vanlukku og sjúku og okkara nærmastu, um tað ringasta skuldi hent.

Eftirlønaravtalan er góð, og tað sama er samlagstryggingin. Í so máta er lítið at óttast fyri viðvíkjandi tí fíggjarliga partinum, um ein skuldi komið illa fyri.

Men tey, sum av einhvørjari orsøk hava annan eftirlønarveitara enn LÍV, kunnu koma í stórar trupulleikar, um tey ikki sjálv ansa eftir, at teirra samlagstrygging eisini er virkin.

Tí av tí, at samlagstryggingin er integrerað í okkara eftirlønaravtalu við LÍV, verður hon eisini sjálvvirkandi goldin av eftirlønarinngjaldinum har. Har er onki meira at hugsa um tá.

Men hevur tú annan eftirlønarveitara, so er samlagstryggingin ikki partur av tí veitingini. Tí Maskinmeistarafelagið hevur bara samlagstryggingaravtalu við LÍV.

Um tú hevur annan eftirlønarveitara, er tí alneyðugt, at tú serstakt eisini rindar fyri samlagstryggingina hjá LÍV – um tú væl at merkja ynskir at vera partur av hesi kollektivu tryggingaravtaluni. Tað kann gerast við eini fastari flyting.

Tað kemur tíverri alt ov ofta fyri, at limir fáa sær ein stóran hvøkk, tá teir knappliga fáa brúk fyri síni samlagstrygging og tástani finna út av, at tey hava onga – tí tey hava ikki goldið tryggingargjøldini.

Tað er ein vanlukkulig støða at koma í, og tað ringasta er, at har kemst ikki afturumaftur. Hevur tú ikki tína eftirløn hjá LÍV og ikki hevur minst til kortini at rinda fyri tína samlagstrygging har, so hevur tú onga virkna samlagstrygging og ført tískil heldur ikki eitt oyra haðani.

Tí skal tað vera mín inniliga áheitan á tykkum limir um at eftirkanna tykkara eftirlønar- og tryggingarviðurskifti at vissa tykkum um, at hesi viðurskifti eru, sum tit halda.

Gott summar øll somul



***Ólavur Gunnarsson***
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*



# Maskinmeistara-bossur í sløk 30 ár

**Eingin hevur sitið so leingi á trónini í Maskinmeistarafelagnum, sum kvívíkingurin Atli Jensen. Í sløk 30 ár var hann formaður felagsins, og hesa tíðina stríddist hann fyri at vinna maskinmeistarafakinum ta virðing, sum hann helt fakið hava uppiborið. Ikki minst var tað lønarliga fakfelagsarbeiðið, hann arbeiddi við.**
**Atli Jensen andaðist 16 dagar eftir, at hendan samrøðan varð gjørd**

**Tekstur og myndir**:
Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Vit sita í uttaru stovu í heiminum hjá Atla Jensen í Kvívík – hjá Gamla Andrassi, rópt. Út ímóti Havursgarði. Gamli Andrass var abbi Atla.

Hann er errin av hesum gomlu húsunum, heiminum hjá abbanum, sum hann er byrjaður at gera í stand. Men vit fara ikki at tosa so nógv um hesi húsini, heldur um tilgongd hansara, sum endaði við, at hann í nærum 30 ár sat sum formaður í Maskinmeistarafelagnum. Her snýr tað seg fyrst og fremst um maskinmeistaran Atla Jensen. Um hvussu hann longu sum unglingi fór at vísa áhuga fyri mekanikki, teknikki, ja, fyri maskinum, motorum og bilum. Og maskinmeistari gjørdist hann um ein háls.

Tað var tann  tíð, tá hann var gerandisgestur í føroysku stovunum sum bilkønur. Vitugur, virkin og vónríkur um at gera mun. Og so vóru tað sáttmálasamráðingarnar og onnur átrokandi mál hjá Maskinmeistarafelagnum. Maskinskúlin hevði eisini hansara stóra áhuga.

Mangar vóru tískil orsøkirnar at venda sær til Atla Jensen, og av somu grund var hann eisini ein teirra, sum tíðum var við í almenna kjakinum, kjak, sum skuldi broyta viðurskiftini til tað betra, tað veri seg á føroysku vegunum, í maskinrúminum ella á maskinskúlabeinkinum.

Seinastu árini hevur lítið verið at hoyrt til hansara. Hann er ikki longur í andglettinum, men hevur seinnu árini nýtt tíð sína í Kvívík, har hann eisini sleit barnaskógvar sínar.

Hendan dagin, vit hittast í Kvívík, er hann væl fyri, men tað er greitt, at vanin at tosa við tíðindafólk er skeiklaður nakað. Hann skal mestsum stilla kumpassina av nýggjum.

Uttanfyri er eitt lítið lot. Hann er høgur í ættini og kølið.

Fartelefonin liggur á borðinum frammanfyri hann. Og nú ringir. Hann tekur telefonina, og í hinum endanum er sonurin, Andrass, so frægt hoyrist tvørtur um borðið.

– Um eg eri uppi? Ja, uppi eri eg. Jú, jú, her situr ein maður, og her er ein øðilig rúgva av øllum møguligum tólum á borðinum, eg veit ikki hvat hetta er, myndatól og alt møguligt. Greiða mær, tað veit eg ikki, um eg greiði mær, smírist hann. Ja góði, vit hoyrast, sigur hann so og leggur telefonina aftur á borðið.

Aftaná samrøðuna við sonin sær út til, at kumpassin longu er stillað, og nú losnar prátið. Nú kenni eg Atla Jensen aftur, júst soleiðis sum eg plagdi at hoyra hann í Útvarpi Føroya á sinni. Ella tá eg fór upp til próvroynd at taka koyrikortið. Atli setti mær nakrar spurningar um teori, og síðan varð prátað um familju mína, serliga í Leynum, sum jú liggur í Kvívíkar Kommunu. So onkursvegna kendu vit okkum sum skyldmenn ta løtuna.

**Lærdi hjá Wenzel Petersen**
Atli Jensen tók handverkaraútbúgving í Smiðjuni hjá Wenzeli Petersen úti á Bakka í Havn, hann byrjaði læruna í 1949. Lærumeistari hansara var Johannes Petersen, sonur Wenzel Petersen. Atli Jensen sigur, at Johannes Petersen mundi vera



*Atli frammanfyri heim sítt í Kvívík seinastu árini – hjá Gamla Andrassi, abba hansara*

navnframasti føroyingur á tí økinum nakrantíð. Hann var útbúgvin sivilverkfrøðingur og arbeiddi seinni sum tøkniligur stjóri hjá Burmeister & Wain í nógv ár.

Johannes Petersen kom í grundini til Føroya, tí hann umhugsaði at smíða framkomin skip til føroyingar. Tá vóru nógvar gamlar dangur í Føroyum, niðurslitin bretsk skip, sum føroyingar keyptu úr Íslandi. Men Johannes Petersen slepti hesum ætlanum.

– Tað var eftir at hann slepti ætlanunum at smíða skip í Føroyum, at hann gjørdist tøkniligur stjóri hjá Burmeister & Wain. Hann fekk eisini í boði at gerast professari á Keypmannahavnar Universiteti, men tað vildi hann ikki. Hinvegin undirvísti hann á universitetinum í fleiri ár við síðuna av arbeiðnum á Burmeister og Wain, sigur Atli Jensen.

Hann vísir eisini á, at Johannes Petersen seinni gjørdist heimskendur, tí hann var fyrstur í heiminum at gera eina nýggja sonevnda "stabilitets-kurvu". Tað snýr seg um ein útrokningarhátt, sum verður nýttur at rokna stabilitet á skipum út í mun til ferð, longd, breidd og so framvegis.

– Frammanundan høvdu tey nýtt ein grikskan útrokningarhátt, men tá Johannes Petersen var komin við sínum støddfrøðiliga útrokningarhátti, varð tann hátturin nýttur allastaðni í heiminum. Hann varð eisini róptur "Petersenski útrokningarhátturin", greiðir Atli Jensen frá.

Tá Atli var í læru úti á Bakka, var smiðjan hjá Wenzeli Petersen størsta smiðjan í Føroyum, einir fjøruti mans arbeiddu har. Hann lærdi millum annað saman við Jógvani Ki Jacobsen, sum seinni arbeiddi mong harrans ár sum húsavørður í Føroya Banka. Ein annar, ið arbeiddi hjá Wenzeli tá, var Hjalgrím Hentze, sum seinni gjørdist versonur Wenzel Petersen.

– Vit lærlingar vóru runt í allari smiðjuni, arbeiddu upp á bilar, gjørdu sentralvarmar, dampmaskinur, motorar og so framvegis. Tað var ikki tað ting, vit ikki gjørdu.

Hann greiðir frá, at bilverkstaðið hjá Wenzel var í "Eingilskmannagarasjuni" uppi við katolikkakleystrið, har var alt, sum æt bilar.

– Vit kundu seta okkum upp á ein lista, um tú vildi arbeiða upp á bilar, motorar og so framvegis. Sjálvur valdi eg at arbeiða við øllum, og tí var eg útbúgvin smiður, tá lærutíðin var liðug, sigur Atli.

## Ungir lærlingar til Tjørnuvíkar

Hann minnist aftur á mongu sløgini av motorum í Føroyum tá. Men ein



*Hann myndaði leiðsluna í Maskinmeistarafelagnum í útvið 30 ár, og fekk í tíð síni føroyskum maskinmeistarum virðiligar sáttmálar og virðiligar umstøður sum heild*

amerikanskur motorur kom ongantíð til Føroya sum umboð. Einasti bátur, sum hevði hetta slagið av motori í Føroyum, var rutubáturin Reynir, sum Hans Pauli á Bø í Haldórsvík átti. Báturin varð keyptur úr Íslandi, og tá hevði hann hendan amerikanska motorin. Tað serliga við motorinum var, at hann startaði sum ein bensinmotorur – við tendriproppum.

– Tá hann so var komin í snúningar, so skiftu teir til diesel. Teir kundu eisini nýta tungolju, og onkur teirra vildi vera við, at teir eisini kundu geva eitt íkast við lýsi, um illa vildi til, sigur Atli Jensen.

Ein dagin skuldu Atli Jensen, Jógvan Ki og onkur annar til Tjørnuvíkar í arbeiðsørindum. Og teir fóru norður við hesum sama Reynir.

– Reynir sigldi rutu í Sundalagnum, onkuntíð eisini suður til Havnar, men hann kundi ikki sigla eftir ferðaætlan, sum onnur skip, hann kundi bara sigla eftir klokku. Streymurin skiftir bara tvær ferðir um dagin í Sundalagnum, og tá tað var sterkur mótstreymur, megnaði Reynir ikki at sigla um Streymin. So har var eitt at gera hjá okkum, og tað var at bíða umborð á Reyni í Streymnesi, til sjóvarfallið skifti, minnist Atli Jensen.

Tað var vorðið myrkt, áðrenn teir stevndu norður um Streymin og norður til Tjørnuvíkar. Við sær høvdu teir tilfar til eitt vesi, sum skuldi gerast í skúlanum í Tjørnuvík, og sentralhiti skuldi eisini leggjast inn.

– Tá vit komu til Tjørnuvíkar, var nógvur súgur í sjónum, og tað sum hendi var, at eg í øllum hesum súginum misti vesikummuna niður ímillum Reynir og klettin, og hon fór í knús. Í einar tvær til tríggjar vikur eftir hetta var illveður, so ongin nýggj kumma kom norður. Jógva Ki noyddist suðuraftur, so eg var einsamallur at leggja sentralvarman og gera vesið. Men kumman, hon vantaði – sum sagt.

Júst hetta árið var nógv omanlop í Tjørnuvík, og Atli hjálpti tjørnuvíkingum at grava omanlopini burtur.

Ein vika fór, tvær vikur fóru og tríggjar vikur fóru, men ongin vesikumma kom norður til Tjørnuvíkar.

– Í Tjørnuvík búði ein ordans "orginalur" tá, sum vit plagdu at siga, hann varð róptur Pagga. Hann gekk hvønn einasta dag til Haldórsvíkar eftir posti millum annað. Men at bera vesikummuna norður til Tjørnuvíkar, tað noktaði hann, ikki talingur um. Endin varð, at eg varð sendur til Haldórsvíkar eftir vesikummuni, og noyddist at bera hana norður.

– Líkamikið, eg setti vesikummuna upp, og tað kundi verið spennandi at

vita, um hon stendur har enn, men nú verður gamli skúlin jú brúktur sum eitt slag av mentanarhúsi, og har er ivaleyst nógv broytt, hugleiðir Atli Jensen.

Hann noyddist at ganga allan vegin suðuraftur til Havnar. Við í ferðalagnum var Dávur í Tjørnuvík, Dávur Davidsen. Atli Jensen minnist, at Dávur var so óvanliga íðin tjóðveldismaður. Hann var ógvuliga fegin um framgongdina í bygdini, sum hevði fingið nýggjan skúla við sentralhita og vesi og tað heila.

– Men eitt kundi hann siga okkum, at tað fór ikki at ganga so øðiliga long tíð, fyrr enn Føroyar fingu loysing. Og tað skuldi vera vist, at tá fór stutt tí at ganga, til tað varð koyrandi eftir vegum heilt úr Tjørnuvík til Havnar. Eg hugsaði við mær sjálvum, at hasin maðurin kundi ikki vera rættsiktaður. Men hygg í dag, nú siga tey, at tey eisini vilja hava tunnil til Tjørnuvíkar, flennir Atli Jensen.



### Smádrongur undir krígnum

Atli Jensen varð borin í heim í Kvívík hin 21. juli 1933, og hann hevur upplivað nógv í lívi sínum.

Ein hending fyri 82 árum síðan stendur høgd inn í minni hansara, tá var hann bara seks ára gamal.

– Eg hevði tríggjar systrar. Ein dagin sigur mamma við meg, at hon og pápi fara ein túr oman í Urð. Hon sigur mær eisini, at Helena, systi, sum tá var trý ára gomul, er farin í song, og hon hevur dukkuna við sær. Sjálvur sat eg og blaðaði í einum norskum barnablað, vit høvdu altíð nógv norsk barnabløð. Meðan eg siti har í køkinum og hyggi í hetta blaðið, hvøkki eg við, tá eg hoyri eitt ljóð av loftinum.

Hann tveitir blaðið frá sær og rennur upp á loft og inn á kamarið, har Helena liggur.

– Tann sjónin, eg tá sá, var ræðulig og hevur havt ávirkan á alla mín tilveru heilt fram til dagin í dag. Tí har stendur songin í einum eldhavi, og Helena undir dýnuni. Skiparin Kristian Danielsen, pápi Birgir Danielsen, stóð á trappuni beint hinumegin húsini hjá okkum. Hann sær, tá eg komi brestandi út gjøgnum altanhurðina í kamarinum, og tveiti brennandi dýnuna út, minnist Atli.

Kristian var sum eitt snarljós, leyp yvir um vegin, inn í gongina og upp á loftið. Har tók hann illa brendu trý ára gomlu gentuna upp og fór í skundi út við henni. Men lítla Helena doyði.

– Eg dugi illa at siga frá, hvussu handan hendingin hevur pínt meg alt mítt lív, sigur Atli Jensen álvarsamur og hyggur út gjøgnum vindeygað.

Fyri nøkrum døgum síðan setti hann ein gravstein á grøvina hjá lítlu systur síni, sum fór alt ov ung. Og hinumegin húsini, sum standa frammanfyri hjá Gamla Andrassi, her Atli situr í løtuni, er Gamli kirkjugarðurin. Har er grøvin hjá lítlu Helenu við spildurnýggja gravsteininum.

### Áhugin fyri teknikki

Longu frá heilt ungum árum hevði Atli Jensen áhuga fyri maskinum, bilum og teknikki sum heild. Hann og vinmaður hansara Viggo byrjaðu longu sum níggju ára gamlir at arbeiða upp á bilin hjá bygdarráðsformanninum, sum als einki skil hevði fyri slíkum.

Sjálvur tekur Atli soleiðis til:

– Eg havi frá smádrongi av havt ein sovorðnan fortrøllaðan áhuga fyri bilum, alt vóru bilar, eg var bilgalin, og tað vóru bara tveir bilar í økinum, ein í Kvívík og ein í Leynum. Hendan seinna átti Jógvan í Leynum. Jógvan í Leynum



*Atli Jensen við borðið í uttaru stovuni í gamla heiminum hjá abbanum í Kvívík, hjá Gamla Andrassi*

dugdi alt, hann var so røkin. Kristian Danielsen, bygdarráðsformaðurin, var eisini ein ógvuliga dámligur maður, sterkur sum ein traktorur, hann lyfti petroleumstunnurnar upp í bilin við handamegi. Altíð blíður og hjálpsamur. Men at koyra bil og at arbeiða upp á bil, nei, tað var ikki hansara sterka síða. So Viggo og eg arbeiddu upp á bilin. Og megnaðu vit tað ikki, so koyrdi hann fram til Gjónna við Leynarvatn, og har fekk hann smiðin at gera tað, sum gerast skuldi. Og vit báðir, Viggo og eg, vóru altíð við. Smiðurin, Janus, dugdi alt, til dømis dugdi hann at sveisa í eldi, sigur Atli Jensen.

Soleiðis raknaði áhugin fyri bilum og maskinum.

Tá hann var liðugur í skúlanum, fór hann at læra til timburmann, men tað var ikki rætta hillin, so hann gavst.

– Sannleikin var tann, at eg fekk skaða ein dagin, vit løgdu sperrur í einum sethúsum. Tað var kavi og fryst. Eg var áhaldsin og datt heilt niður í kjallaran, og lá í óviti í 21 dagar. Tá hildu øll, at eg fór at doyggja, men eg kom fyri meg aftur, og tá fór eg á ein altjóða háskúla í Helsingør í Danmark.

Í Helsingør var ein stór skipasmiðja, og har lat DFDS allar sínar ferjur smíða. Atli Jensen fekk stóran áhuga fyri hesum arbeiðnum, og byrjaði at ganga niðri á skipasmiðjuni. Ein dagin skrivaði hann eitt bræv heim til pápan og segði honum, at um hann fekk lærupláss hjá Wenzeli Petersen, so fór hann at taka av.

– Og eg kom í læru. Har vóru bilar, sentralvarmar, dampmaskinur, ja, har var alt. Tað var eitt nógv størri arbeiðspláss enn skipasmiðjan í Havn tá. Og so var tað, at sonur Wenzel, Johannes Petersen, kom heim at arbeiða. Vit høvdu so stóra virðing fyri honum, at bað hann okkum leypa á sjógv, so høvdu vit ivaleyst gjørt tað, heldur Atli.

## Motorarnir komu

Tað var eftir, at Søren úr Kunoy gjørdist leiðari á verkstaðnum hjá Wenzeli Petersen, at motorar av álvara byrjaðu at verða settir í sluppirnar.

– Teir vilja vera við, at Søren úr Kunoy mundi vera eitt tað største begávilsi, sum hevur gingið í Føroyum. Og hann hevði drúgvar royndir. Hann hevði arbeitt í Norra, hann hevði arbeitt á stálverkum í Svøríki, og hann hevði arbeitt hjá Alfa Diesel í Danmark. Hann setti allar teir fyrstu motorarnar í føroysku sluppirnar, og hann setti skrúvuna út gjøgnum hekkuna, tí skipararnir vildu ikki hava skrúvuna út gjøgnum róðurblaðið, tí so mistu teir nøkur stýrievni. Hann var fantastiskur, hesin Søren úr Kunoy. Og alt hetta vakti mín stóra áhuga fyri maskin-meistarayrkinum, greiðir Atli Jensen frá.

Fyri at fáa vinnubræv sum maskin-meistari tá í tíðini skuldi tú hava verið við dampmaskinu. Tí fór Atli ein túr við Tórfinni. Annars vóru tað so fá skip, sum sigldu við dampi, Stella Argus og onkur onnur gomul danga. Men Smyril sigldi við dampi, og tí fóru nógvir ungir menn umborð á hann fyri at fáa tíðina við dampmaskinu.

## Vísindaligar kanningar

Atli Jensen tók fyrsta part av maskin-meistaraútbúgvingini í Føroyum. Áðrenn hann nakrar mánaðir seinni fór niður til Danmarkar at lesa víðari, giftust hann og Jóhanna Helena, sum er ættað av Glyvrum.

Brúðarferðin varð gjørd yvir til Birmingham við Gullfinni, Atli búði í lugarinum, og konan í kahúttuni. Í Birmingham fór Atli Jensen í kvøld-skúla at læra seg meira enskt, og hann fekk samstundis arbeiði á einum bilverkstaði, sum hevði eina tekniska royndarstøð, ið gjørdi vísindaligar kanningar. Millum annað gjørdu teir royndir við “leysum fóðringum” í einum sylindara á einum bilmotori.

– Eg kom á eina deild, sum gjørdi tekniskar royndir við ekspansjón, stempulringum og líknandi. Vit gjørdu eisini royndir við at fáa hydrauliskar bremsur á øll fýra hjólini. Framman-undan vóru bremsurnar mekaniskar, tað vóru veirar og stengur, sum skuldu smyrjast, annars stóð tað fast, sigur hann.

Atli Jensen lærdi nógv nýtt í Birming-ham, sum kom honum væl við fakliga restina av arbeiðslívi sínum.

Eftir at hava tikið víðkað maskin-meistaraprógv í Keypmannahavn, sigldi hann eitt skifti við donskum ferjum, áðrenn hann varð biðin at koma við Tjaldrinum. Sum ynsgsti maður hevði hann størstu útbúgvingina umborð.

– Eg var tann einasti umborð, sum hevði alla elektrisku útbúgvingina, minnist hann.

Í 1960 gjørdist hann stjóri á Bileftirliti-num, og hann var stjóri á stovninum í 36 ár – til 1996. Hetta bilgalna, mekaniska begávilsið úr Kvívík endaði júst har hann skuldi, sum bilinspektør-ur og sum fyrsti stjórin á sjálvum Bileftirlitinum.



***Stutt áðrenn hann sjálvur brádliga andaðist, setti Atli ein gravstein upp á grøvini hjá lítlu systrini, sum doyði so vanlukkuliga fyri 82 árum síðani***

**Í Maskinmeistarafelagið**
Tá ið Atli Jensen fór í land av Tjaldrinum, var støðan tann, at manningin ongan sáttmála hevði. Fyrst í sekstiárunum, 1961 ella 1962, fór Atli umborð aftur á Tjaldrið at vitja maskinmenninar, sum hann hevði arbeitt saman við. Tá helt hann fyri við teir, at nakað mátti gerast fyri at vinna hesi stættini ta tign, hon hevði uppiborið.

– Vit hava eina útbúgving, sum liggur langt omanfyri tað tvífalda av tí, sum stýrimenn og skiparar læra, hvat skúla viðvíkur. Og tað er ongin av teimum, sum hevur ánilsi av, hvussu ein motorur er innrættaður. Vit mugu menna okkum, og vit mugu gera tað sjálvir, segði eg teimum hendan dagin umborð á Tjaldrinum.

Og so fór Atli Jensen í gongd við stríðið at vinna maskinmeistarum betri umstøður á øllum økjum, og tað eydnaðist. Nógvir føroyskir maskinmeistarar sigldu úti við A.P. Møller, ØK og Lauritzen um tað mundið, og teir arbeiddu eftir donskum sáttmálum. Men føroyingar høvdu ongan sáttmála, og kundu fáa fótin, nær tað skuldi vera, uttan at tað fekk nakrar avleiðingar.

– Eg fekk Schrøder, varastjóran á Skipafelagnum, so spakuliga við upp á hetta. Eg vísti honum á, at maskinstjórin á Tjaldrinum arbeiddi eftir donskum sáttmála, og hinir í maskinuni máttu eisini fáa góðan sáttmála. Jú, segði Schrøder, men hvat so við teimum á brúnni. Nei, tað er ikki okkara borð, svaraði eg honum.

– Líkamikið, so væl gekk, at ein dagin kom skiparin á Tjaldrinum til mín, og hann spyr, um vit ikki kunnu gera eina deild fyri skiparar og stýrimenn - í Maskinmeistarafelagnum. Tað helt eg nú vera eitt sindur løgið. Men vit, Maskinmeistarafelagið, vit fingu okkara sáttmála, sigur hann.

Stutt eftir hetta, miðskeiðis í 1960-unum, gjørdist Atli Jensen formaður í Maskinmeistarafelagnum.

– Eg minnist, at stutt eftir sakk eitt skip hjá John Dam. Tað spurdist eitt sindur av roki aftaná, tí maskinmeistararnir settu fram endurgjaldskrav fyri klæðir og annað, sum teir høvdu mist. Eg vísti teimum bara á sáttmálan, og har stóð púra greitt, at teir høvdu krav upp á endurgjald. Tað mundi vera fyrstu ferð, at manning fekk endurgjald fyri slíkt – eftir einum sáttmála væl at merkja, sigur hann.

Um sama mundið byrjaði hann at royna at rætta ymisk viðurskifti á Maskinskúlanum, sum hann metti lítið og einki skil vera í. Tað hjálpti nakað, men so kom krav úr Danmark, at Maskinskúlin skuldi hava brandskeið í sambandi við útbúgvingina.

– Úr landsstýrinum fekk eg at vita, at tað nýttist ongin brandskúli í Føroyum. Eg segði teimum so, at tað var onki at velja í, tí tað var eitt krav, annars varð skúlin ikki góðkendur, vísti hann á.

Endin var, at Atli Jensen bílegði eitt byggisett til ein brandskúla, sum eftir tógvið stríð varð settur upp við Áir. Og har stendur hann enn.

Hann stríddist eisini í mong ár við at fáa bygt ein nýggjan maskinskúla. Eitt skifti, meðan Poul Michelsen var borgarstjóri í Havn, lovaði hann, at kommunan skuldi byggja skúlan, um ongin annar gjørdi tað.

– Meinar tú tað, spurdi Atli.

– Ja, tað meini eg, svaraði Poul Michelsen.

Men tann ætlanin varð steðgað í Løgtinginum.

– Tað fekk eg nakrar ábreiðslur fyri, og tá hugsaði eg, at nú var mín tíð sum formaður í Maskinmeistarafelagnum av. Eg segði meg úr formanssessinum, og síðan havi eg ikki verið á einum maskinmeistarafundi, sigur Atli Jensen.

Tá hevði hann verið formaður í felagnum í sløk 30 ár.

Eg rætti Atla Jensen lógvan og takki fyri hesar áhugaverdu tímarnar í stovuni hjá Gamla Andrassi í Kvívík. Vit koma ásamt um at hittast aftur at gera samrøðuna lidna.

Sekstan dagar seinni andaðist Atli Jensen brádliga.

Sí eisini minningarorð á síðu 19.



# Sáttmálafriður eina løtu

**Koronafarsóttin hevur av álvara órógvað sáttmálasamráðingarnar síðani í fjør vár. Kortini eydnaðist tað at fáa allar teir føroysku sáttmálarnar til høldar. Stígur er tó í samráðingunum um teir grønlendsku sáttmálarnar**

**Tekstur og mynd:**
Ingolf S. Olsen – PRESS

Sáttmálasamráðingar og viðurskiftini við arbeiðsgevarafeløgini, sum Maskinmeistarafelagið hevur sáttmálar við, fylla altíð nógv í formansfrágreiðingunum á aðalfundunum hjá Maskinmeistarafelagnum. Í so máta var aðalfundurin 13. mars í ár onki undantak.

Men í formansrøðuni kundi Ólavur Gunnarsson staðfesta, at tað nærum var slætt borð á sáttmálaøkinum. Á øllum sáttmálaøkjunum hevur korona verið ein stór avbjóðing í gerandisdegnum hjá limunum í Maskinmeistarafelagnum, kundi hann staðfesta.

Her er ein samandráttur av tí, Ólavur Gunnarsson í síni formansfrágreiðing segði um sáttmálastøðuna. Øll formansfrágreiðingin kann lesast á heimasíðuni hjá Maskinmeistarafelagnum, www.mf.fo



*Korona hevur verið ein stór avbjóðing hjá maskinmeistarum á øllum sáttmálaøkjum, kundi Ólavur Gunnarsson staðfesta í sín formansrøðu. Men allir teir føroysku sáttmálarnir komu til høldar*

**Fíggjarmálaráðið**

Samráðingarnar við Fíggjarmálaráðið vóru ímillum teirra, sum blivu niðurlagdar, tá farsóttin rakti.

10. juni blivu tær so tiknar uppaftur. Og hóast fíggjarmálaráðharrin á fundi hevði róð fram undir eina nullloysn, so borðreiddi lønardeildin við einum nýggjum lønarkarmi fyri trý ár áljóðandi 595 krónur, svarandi til 1,86 prosent fyri eina løn upp á 32.000 krónur um mánaðin fyrsta árið, 1,73 prosent næsta árið og 1,2 prosent triðja árið.

Samráðst varð síðan til 6. juli, tá partarnir skrivaðu undir semju um nýggjan trý ára sáttmála, har karmurin var 2,56 , 2,05 og 1,25 prosent fyri ávikavist fyrsta, annað og triðja árið. Harumframt blivu aðrar tillagingar gjørdar í teimum ymisku sáttmálunum. Eitt nú bleiv lønin fyri jóladag og langafríggjadag innroknað í lønartalvuna í SSL-sáttmálanum, viðbøturnar fyri tilkallivakt blivu dagførdar í sáttmálanum fyri alment sett á landi, og bæði sáttmálin og lønartalvan fyri Magnus Heinason blivu víðkað og dagførd, soleiðis at hesi nú eisini umfata nýggja havrannsóknarskipið Jákup Sverra.

Grundað á, at Tænastumannafelagið eigur lønartalvuna hjá teimum, sum eru settir á Vørn, gjørdu vit av at bíða við at skriva undir hendan sáttmálan. Men tann 18. september var komið har til, at eisini hann bleiv undirskrivaður. Her blivu eisini onkrar tillagingar gjørdar,



*Ólavur Gunnarsson heldur formansrøðuna. Aftanfyri eru tað Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum, og Eyðbjørn Larsen, advokatur hjá Sókn Advokatum, ið var fundarstjóri*

eitt nú blivu vaktargjøldini dagførd, nýggj áseting gjørd um úrtíðarløn, og tillagingar blivu gjørdar í greinunum, sum umfata maskinmeistarar við vantandi siglingstíð og aspirantar.

Tað hava eisini verið avbjóðingar á øðrum mótum her, eitt nú við vaktarskipanini hjá Teistanum – hetta hevur eisini verið ein av høvuðssøgunum í fjølmiðlunum. Vit komu eisini inn í málið, og eftir fleiri ferðir at hava vent og snarað øllum rundan um hetta málið, bleiv ein semja gjørd, sum báðir partar vóru nøgdir við.

### Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Tá ið vit skrivaðu undir semjuna við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF, fyri seinasta sáttmálaskeiðið, bleiv ein nýggj lønartalva sjósett.

Tillagingarnar høvdu við sær, at tað fyri ein stóran part vóru tær lægru lønirnar, sum fingu ta lutfalsliga størstu lønarhækkingina. 19. juni blivu hesar samráðingarnar so tiknar upp aftur eftir ein steðg uppá góðar tríggjar mánaðir. Eins og við samráðingunum við Fíggjarmálaráðið var hettar sum at byrja fullkomiliga av nýggjum.

Vit høvdu longu frá byrjan gjørt av, hvar okkara absolutta pínumark lá, og tað kom ikki uppá tal at skriva undir nakra semju, har vaktmeistararnir í Vági og Vestmanna ikki fingu somu viðbót afturat lønini, sum fyrstuvaktmeistararnir á Sundi høvdu fingið við seinastu samráðingum.

Tað rak hart á kíkin, men við bit og slit bleiv ein semja loksins skrivað undir 8. juli við sama karmi sum sáttmálarnir við Fíggjarmálaráðið, og við nevndu viðbót til teir vaktmeistarar, ið ikki høvdu hana frammanundan.

Orsøkin til, at vit yvirhøvur kundu góðtaka eina slíka loysn, var tann áður nevnda, at teir lægru lønarflokkarnir, sum bert fingu lønarhækking samsvarandi karmin hesaferð, fingu eina lutfalsliga hægri lønarhækking í semjuni, sum bleiv gjørd í 2019.

Vit hava seinastu tíðina sæð, at eitt nú SEV hevur umskipað sítt virksemi, soleiðis at umsitingin av sjálvum netinum í meginøkinum, sum altíð hevur verið í Vestmanna, nú er á veg til høvuðssætið í Havn. Søkt hevur eisini verið eftir fólki at taka sær av hesari funksjónini, og her hevur SEV breiðkað skaran, sum hesi størvini venda sær til, soleiðis at hann eisini umfatar fólk við aðrari hægri elteknískari útbúgving enn maskinmeistaraútbúgving.

Vit hava gjørt vart við okkum í hesum sambandi og hava eisini verið á fundi við umboð fyri SEV fyri at fregnast um orsøkina til hetta. Tey hava vissað okkum um, at orsøkin er, at tað eru so nógvar ymiskar uppgávur, sum eru, og sum fara at verða útbygdar í framtíðini, og fyri at taka sær av teimum er brúk fyri at manna upp við fólki við ymiskum øðrum útbúgvingum.

SEV hevur eisini tryggjað okkum, at tað sjálvandi eisini verður brúk fyri maskinmeistarum í hesum hópinum, og vantandi fara tað at verða enn fleiri maskinmeistarar settir í hesi størvini í framtíðini.

### Føroya Reiðarafelag

Sum sagt frá á seinasta aðalfundi, sum var 23. mai í fjør, so eydnaðist ikki at koma á mál við samráðingunum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag við egnari hjálp.

Mikudagin 20. mai (í 2020, blðm.) bleiv Semingsstovnurin boðsendur. Farið var undir seming á middegi mánadagin 25. mai, og fríggjakvøldið 29. mai bleiv eitt semingsuppskot lagt fyri partarnar. Freistin at svara var á middegi dagin eftir, og um vit tóku undir við tí, skuldu vit møta í hølunum hjá Semingsstovninum í losjuni í Havn. Tá avtornaði, møttu allir partar, og stutt eftir middag leygardagin 30. mai bleiv nýggjur tvey ára sáttmáli undirskrivaður.

Tað vóru ávísir batar í semjuni, eitt nú kann nevnast eykagjald fyri at mynstra millum jóla og nýggjárs, endurgjald fyri arbeiðsklæði, hækkan av prísmarkinum fyri, nær manning skal taka lut í gjaldinum fyri brenniolju í ávísum skipabólkum, hækkan av eftirlønargjaldinum hjá reiðarunum, og sum nakað nýtt skulu reiðarar nú tekna eina lívs- og brásjúkutrygging fyri fólkið.

Í fiskivinnuni uppliva vit ferð eftir ferð tað keðiliga, at tilfeingisgjøldini, sum verða løgd á pelagiska tilfeingið og botnfiskin í Barentshavinum, verða brúkt til at fáa politiskar líkningar at ganga upp. Við hesum ger tann politiski myndugleikin seg áhaldandi inn á sáttmálaviðurskiftini. Nú er so aftur ein nýggjur leistur fyri tilfeingisgjøldini

á veg. Ein leistur, sum politikarar saman við reiðarunum hava snikkað til. Eg haldi tað vera ein sera løgin máti, at annar sáttmálaparturin, nevniliga reiðararnir, verða tiknir við í arbeiðið at gera nýggja leistin, men hin parturin, manningarfeløgini, ikki so frægt sum verður kunnaður um, hvat arbeitt verður við.

Árið, sum er farið, hevur verið merkt av koronufarsóttini, og allur flotin hevur følt sviðan av hesum. Prísirnir á so at siga øllum fiskasløgum, tað veri seg á uppsjóvarfiski ella botnfiski, eru falnir nógv, og hóast onkur prísur hevur javnað seg aftur, so liggja aðrir framvegis í botni. Hettar hevur sjálvandi gjørt, at hýrurnar seinasta ár vóru væl lægri enn árini frammanundan.

Eisini hava vit upplivað aðrar trupulleikar av farsóttini, har fólk ikki hevur fingið mynstrað, tí tey eru sett í sóttarhald. Her hava vit dømi um, at onkur, sum skuldi til fiskiskap á fjarleiðum, ikki kundi mynstra, og orsakað av, at viðkomandi ikki átti at verða umborð túrin eftir, reyk út við helvtin av árshýruni. Hettar er eitt dømi um, at sjófólk standa í einari sera vánaligari støðu, tá tað snýr seg um at fáa hjálp.

Vit hava gjørt politiska myndugleikan varugan við trupulleikan, men hevur tað verið úrslitaleyst. Sostatt tykist tað, sum at sjófólk bara eru áhugaverd, tá tað ræður um at fylla í teir ymisku kassarnar, men áhugin hinvegin er evarska lítil, tá tað skal gjaldast eitt oyra úr hesum kassunum.







*Soleiðis arbeiða teir 613 virknu limirnir í Maskinmeistarafelagnum. Stívliga 70 sigla, annaðhvørt í farmavinnuni ella við fiskiskipum, og restin, sløk 30 prosent, arbeiðir á landi í Føroyum*

## Føroya Arbeiðsgevarafelag

Sáttmálin við Føroya Arbeiðsgevarafelag gekk út 1. juni í fjør, men av tí, at vit av álvara vóru komin í eldin í samráðingum, tá ið samfelagið lat so frægt upp aftur í mai mánað, bóðu vit um at fáa longt sáttmálaskeiðið við trimum mánaðum til 1. september.

21. august blivu krøvini so handað, og eftir at hava havt intensar samráðingar vóru vit komin har til, at klárt var at skriva undir ein tvey ára sáttmála tíggju dagar seinni. Karmurin var 2,05 prosent fyrra árið og 1,25 prosent tað seinna árið. Viðbótarstigini vóru hækkað við 50 krónum fyri hvørt stigið. Vaktargjøldini fyri tilkallivaktir blivu eisini dagførd, soleiðis at tey umframt karmin blivu lyft við umleið 70 oyrum. Harumframt fingu vit ásetingar um arbeiðsklæði inn í sáttmálan til stóra gleði fyri onkrar av limunum.

Tað sær annars út til, at tað verða settir fleiri maskinmeistarar í hesum geiranum. Serliga eru tað størri vinnueindir knýttar at alingini, sum bera stóran part av hesum vøkstrinum. Í hesum sambandi er vert at nevna nýggja biogassvirkið Førka, har tríggir maskinmeistarar eru í starvi. Tað má sigast at vera sera áhugavert at síggja, at íløgur verða gjørdar í at gagnnýta allar møguleikar, sum eru í hesari vinnu.

## Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Tað dróg út at fáa sett sjøtul á samráðingarnar við Reiðarafelagið fyri Handilsskip, men 9. februar blivu krøvini loksins handað í Vinnuhúsi-

num. Manningarfeløgini høvdu gjørt av at royna leistin við felags samráðingum einaferð enn. Hóast hetta, so vóru tær ikki meira felags enn so, at partarnir hvør í sínum lagi framløgdu síni egnu krøv.

Trupulleikin við hesum samráðingunum er partvíst, at samráðst verður um ein sera breiðan bólk, har gongdin kann verða sera ymisk, eitt nú hjá farmavinnuni mótvegis frálandavinnuni. Og so er veruleikin tann, at fallið í norsku krónuni hevur gjørt tað meira lokkandi at flagga yvir. Soleiðis er talan um samráðingar, har tað verður trýst á spitaran og bremsuna í senn.

Talan er um ein sokallaðan minimumsáttmála, og tí skuldi tað borið til at fingið eitt sindur lagt oman á sáttmálalønina hjá teimum, sum sigla hjá reiðaríunum, har tað gongur væl.

Eftir fyrsta fundin var tó greitt, at krøvini hjá Føroya Fiskimannafelag ikki sampakkaðu serliga væl við tey hjá yvirmannafeløgunum, og tí bleiv avgjørt at skekla Fiskimannafelagið burturúr.

Yvirmannafeløgini gjørdu hinvegin av at seta seg saman fyri at seta eina bukett uppá 10-12 krøv saman burtur úr rúgvuni av krøvum hjá báðum feløgunum. Tá hettar arbeiðið var liðugt, bleiv ein listi við 11 felagskrøvum sendur til Reiðarafelagið fyri Handilsskip.

Ein fundarrøð bleiv síðan avtalað, soleiðis at tað skuldi bera til at røkka á mál, áðrenn sáttmálaskeiðið rann út 1. mars.

Fundast var 15., 18., 19. og 24. februar, og seint hendan seinasta dagin bleiv nýggjur tvey ára sáttmáli undirskrivaður.

Samráðingarnar vóru sera truplar, og orsøkin til tað var í høvuðsheitum krøvini hjá reiðarunum um at fáa gjørt skipanir, sum skuldu gera tað lættari hjá teimum at taka avgerðir uttan um fakfeløgini í serligum førum, eitt nú í sambandi við áleikandi farsóttina.

Yvirmannafeløgini høvdu sum so einki ímóti, at okkurt bleiv gjørt í so máta, men í so fall skuldi tað gerast ígjøgnum feløgini.

Eisini høvdu reiðararnir krøv um at lætta um møguleikan at siga fólki upp, at gera yvirtíð upp yvir eitt longri tíðarskeið og at fáa møguleika at leingja útmynstringartíðina í frálandavinnuni.

Hesi krøvini høvdu sjálvandi givið meira í lønarposan, vórðu tey gingin á møti, men tað hildu vit ikki, at vit upp á nakran máta kundu.

Endin var, at ein semja bleiv undirskrivað, sum gav generellu lønarhækkingina uppá 2,05 prosent tað fyrra árið og 1,25 prosent tað seinna árið. Vit gjørdu av at leggja eitt hálvt prosent av hækkingini fyrra árið upp á eftirlønina, so hon nú er komin uppá 13 prosent. Umframt hettar bleiv tað til eina øking í viðbótini til einameistarar uppá 232 krónur um mánaðin, og loksins eydnaðist tað eisini at fáa yvirtíðarsatsin øktan fimm prosentstig – hettar var eitt krav, sum vit hava baksast við í fleiri umførum, men sum reiðararnir altíð hava skúgvað frá sær.

## Grønlendskir sáttmálar

Vit hava framvegis trupulleikar við sáttmálanum við grønlendska Polar. Alt byrjaði við, at vit í 2019 blivu gjørdir varugir við, at lønin fyri 2018 ikki var útgoldin á rættan hátt sambært okkara tulking av sáttmálanum.

Vit fóru tá beinanvegin í holt við reiðaríið og fingu okkara løgfrøðing at hyggja upp á tingini. Tá tað tyktist sera trupult at fáa eitt felags forstáilsi fyri viðurskiftunum, bleiv avrátt at royna ósemjuna í einum gerðarrætti svarandi til okkara Fasta Gerðarrætt.

Partarnir valdu hvør sítt umboð í hendan gerðarrættin, og síðan skuldu tey útnevna ein ástøðumann at hava avgerandi orðið.

Grundað á, at støðan var sera umfatandi og trupul, bleiv okkum tilmælt at gera eina sonevnda prosessrisikometing fyri málið, og tá tað vísti seg, at vit onkursvegna høvdu meira at tapa enn vinna, bleiv tað í samráð við mótpartin gjørt av heldur at royna at finna eina semju í málinum. Vit hittust í hesum sambandi í Keypmannahavn í byrjanini av august, og eftir ein góðan fund fingu vit gjørt eitt úrslitarskjal, sum partarnir hvør sær skuldu fara til sítt bakland við, og sum ætlandi skuldi liggja til grund fyri einum nýggjum sáttmála. Ætlanin var so at hittast aftur í oktober at fáa alt endaliga uppá pláss.

Fundurin í oktober bleiv útsettur til november, men tá tað heldur ikki bar til tá, bleiv avrátt at royna at fáa tingini avgreidd við videofundum.

Síðan hava vit havt fimm-seks sovorðnar fundir, uttan nær námind at hava fingið tingini uppá pláss. Heldur hinvegin, partarnir sýnast at glíða longri og longri frá hvørjum øðrum.

Eg kan bara staðfesta, at videofundir eru góðir til nógv samskifti, men sum samráðingaramboð eru teir at kalla ónýtiligir.

Eg eri bangin fyri, at vit enn einaferð noyðast at trýsta á "time out"- knøttin og so hittast aftur, tá høvi býðst, og útlit aftur eru fyri, at tað ber til at fáa eina nýggja avtalu í lag. Vit kunnu ikki annað enn harmast, at hettar hevur drigið so leingi út, men íkomna støðan má heldur ikki trýsta okkum at gera eina avtalu, sum ikki er nøktandi. Ein sáttmáli er galdandi á økinum, og hann er sjálvandi galdandi, til ein nýggjur kemur í staðin, ella í ringasta føri til hann verður uppsagdur, og eingin er at seta í staðin.

Vit hava eisini ein sáttmála við gamla APK, núverandi Grønlands Erhverv. Hesin sáttmálin er frá 2006 og er ikki endurnýggjaður síðan tað, hóast vit óteljandi ferðir hava roynt at sloppið til samráðingarborðið. Men nú tykist loksins glið vera komið á. Ein fyritreyt er tó, at vit fáa Polar-sáttmálan upp á pláss fyrst.



*Nýggja nevndin í Maskinmeistarafelagnum. Úr vinstru eru tað John Højsted, Regin M. Olsen, næstformaður, Ólavur Gunnarsson, formaður, Jóhan Mørkøre, Tummas Eli Høj Joensen og Poul Heri Selfoss annar tiltakslimur. Fyrsti tiltakslimur Róald Johannesen vantar á myndini*

# Nýggj nevnd mannað

**Ólavur Gunnarsson var longu afturvaldur sum formaður uttan mótvalevni áðrenn aðalfundin. Á sjálvum aðalfundinum bleiv Regin M. Olsen afturvaldur og Tummas Eli Høj Joensen nývaldur**

**Tekstur og myndir:**
Ingolf S. Olsen – PRESS

Regin M. Olsen og Berit Hovsgarð vóru upp á val á nevndarvalinum á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum hesa ferð. Umframt tey bæði stillaði Tummas Eli Høj Joensen upp. Úrslitið var, at Regin M. Olsen bleiv afturvaldur og Tummas Eli Høj Joensen nývaldur.

Róald Johannesen varð fyrstvaldur tiltakslimur og Poul Heri Selfos næstvaldur.

Formansvalið bleiv avgreitt longu



*Atkvøðugreiðsla á nevndarvalinum*



*Ongin stillaði upp ímóti sitandi formanni. Ólavi Gunnarsson, og tískil heldur hann fram í formanssessinum næstu trý árini*



*Hóast koronu enn hevði sína køvandi hond á øllum samfelagnum í mars mánað, so var uppmøtingin á aðalfundinum heilt hampulig*

fyri jól, tí tá freistin at stilla upp var úti 15. desember, var greit, at Ólavur Gunnarsson, sitandi formaður, var einasta valevni. Hann bleiv sostatt uttan atkvøðugreiðslu valdur aftur at stjórna felagnum næstu trý árini.

Á sínum fyrsta nevndarfundi eftir aðalfundin skipaði nevndin í Maskinmeistarafelagnum seg. Regin M. Olsen, varð afturvaldur til næstformann í felagnum. Málsøkjabýtið sær soleiðis út:

Ólavur Gunnarsson, formaður, samskipan, norðurlendskt og altjóða arbeiði, Grønlands Erhverv (fyrr Grønlands Arbejdsgiverforening).

Regin M. Olsen, næstformaður: SEV og IRF.

John Højsted: Fiskiskip.

Tummas Eli Høj Joensen: Almenn størv á sjónum, almenn og privat størv á landi.

Jóhan Mørkøre: Handilsskip, FAS og FMU.



*Regin M. Olsen var afturvaldur í nevndina, og tá hon skipaði seg á sínum fyrsta fundi, var hann eisini afturvaldur sum næstformaður*



*Tummas Eli Høj Joensen hevur áður sitið í nevndini í Maskinmeistarafelagnum. Tað eru nógv ár síðan, men nú stillaði hann upp aftur og bleiv valdur*

# Samlagstryggingin:
# Limir detta niður ímillum

**Limir, sum hava annan eftirlønarveitara enn LÍV, skulu sjálvir syrgja fyri at keypa sær samlagstrygging, um teir vilja hava eina slíka. Men ofta verður ikki gáað um hetta, fyrr enn limurin ella avvarðandi eru komin í eina støðu, at tey knappliga hava brúk fyri samlagstryggingini. Tá er tað tó ov seint**



**Tekstur og mynd:**
Ingolf S. Olsen – PRESS

Í síni formansrøðu á aðalfundinum vísti Ólavur Gunnarsson á, hvussu týdningarmikið tað er, at limirnir sjálvir eftirkanna, at teirra eftirlønar- og tryggingarviðurskifti eru í lagi.

Adressan var ítøkiliga teir limir, sum ikki hava tryggingarfelagið LÍV sum sín eftirlønarveitara – og tað hevur hóast alt meginparturin av limunum.

Men teir, sum ikki hava, kunnu tá vera um ein háls, verða teir fyri óhappi ella vanlukku. Og er talan um deyðsvanlukku, er vandi fyri, at tey eftirsitandi eru við sviðusoð.

Maskinmeistarafelagið eigur umvegis p/f Fakfelag sín part í LÍV, og mælir sínum limum at hava sína eftirlønaruppsparing og persónstryggingar har. Men tað er sjálvsagt onki krav, og tað eru limir, ið hava valt annan veitara.

**Tey vita ikki av**

Tey, ið hava sína eftirlønaruppsparing í LÍV, eru tryggjað á tann hátt, at Maskinmeistarafelagið hevur eina eftirlønaravtalu við LÍV, har samlagstrygging er ein integreraður partur. Tað merkir millum annað, at gjaldið til samlagstryggingina automatiskt fer av eftirlønarinngjaldinum.

Tí nýtast limirnir, sum hava LÍV sum veitara, ikki at hugsa so nógv um henda partin – tað gongur alt meira og minni av sær sjálvum.

Trupulleikarnir vísa seg hinvegin hjá teimum limunum, sum ikki hava LÍV sum eftirlønarveitara. Eftirlønarinngjaldið fer gaman í av lønini, sum hjá øllum øðrum, men nú verður onki goldið til samlagstryggingina, sum jú eisini hjá hesum limunum er hjá LÍV – tí Maskinmeistarafelagið hevur onga aðra kollektiva avtalu um samlagstrygging.

Ofta vita limirnir ikki av, at teir onga virkna samlagstrygging hava, um teir til dømis hava skift eftirlønarveitara og ikki samstundis hava hugsað um at tryggja sær, at samlagstryggingargjaldið framhaldandi verður goldið til LÍV við einari fastari flyting.

Tá so óhappið ella vanlukkan er hend, og ein heldur seg hava rætt til útgjald fyri eitt nú hættisliga sjúku, ella avvarðandi skulu hava útgjald við deyða, verður staðfest, at har er ongin virkin samlagstrygging.

Ólavur Gunnarsson hetti í sínari røðu inniliga á limirnar um at kanna eftir, um teirra eftirlønar- og tryggingarviðurskifti vóru soleiðis, sum teir gingu runt og hildu, seliga tá tað um samlagstryggingina ræður.



Atli Jensen var formaður í Maskinmeistarafelagnum í 27 ár og stjóri í Bileftirlitinum í 36 ár

# Minningarorð um Atla Jensen

2. apríl, langafríggjadag, andaðist Atli Jensen, fyrrverandi formaður í Maskinmeistarafelagnum, 87 ára gamal.

Atli var formaður í Maskinmeistarafelagnum í samfull 27 ár, frá 1962 til 1989, og nakað eftir, at hann hevði lagt frá sær, bleiv hann útnevndur til heiðurslim í felagnum fyri sína stóru og drúgvu tænastu.

Atli var føddur í Kvívík í 1933 sum næstelstur av fýra systkjum, og har sleit hann eisini sínar barnaskógvar. Pápi hansara Kristian Jensen var ættaður úr Kvívík. Mamman Jóhanna, fødd Haraldsen, var ættað úr Elduvík.

Tá Atli var tíggju ára gamal, flutti familjan til Havnar at búgva.

Longu sum smádrongur hevði Atli stóran áhuga fyri øllum mekaniskum, so longu tá var tað lítil ivi um, hvørja lívsleið hann fór at ganga. Í 1950 fór hann í læru hjá Wenzeli Petersen, og síðan fór hann víðari til maskinmeistara. Fyrsta partin tók hann í Føroyum, og síðan var hann í Keypmannahavn í 1957-1958 og tók teir báðar seinnu partarnar.

Lívsstarvið hjá Atla bleiv stjórastarvið í Bileftirlitinum. Hann tók við sum stjóri har, longu tá Bileftirlitið var sett á stovn í 1960 og røkti hetta starvið í heili 36 ár – til 1996.

Atli var giftur við Jóhonnu Helenu Jensen, fødd Jacobsen, sum var ættað av Langanesi á Glyvrum – dóttir navnframa skiparan, reiðaran og handilsmannin Napoleon Jacobsen. Tey fingu fýra børn, Kára Jensen, sum er giftur við Eyðvør Jensen, Andrass Jensen, sum er í parlagi við Ninu Lassen, Kristinu Ejdesgaard, gift Johannesi Ejdesgaard, og Gudny Johansen, gift við Kára Johansen.

Í 1996 fluttu Atli og konan til Kvívíkar at búgva, har hann eisini fekk eitt langt lívskvøld.

Í Maskinmeistarafelagnum eru vit so sera takksom fyri tey stóru tøk, sum Atli Jensen tók fyri føroysku maskinmeistararnar og hansara drúgvu tænastu teimum at frama sum formaður í felagnum.

Við hesum vil eg vegna Maskinmeistarafelagið lýsa frið yvir minnið um Atla Jensen.

***Ólavur Gunnarsson,***
*formaður*



*Hesi fingu prógv sum maskinistar 12. mars: Marni Eyðolvsson Joensen, Eyðun Egholm, Tummas Hávard Guttesen, Heri Eli Olsen, Birni Dahl Ljósstein, Eyðun Holm, Danjal Sørensen, Jákup Drayton, Dánial Mikal Kjærbo, Jákup Egholm, Hjørtur Ellingsgaard Rasmussen, Jóhan Kallsoy, Jóan Petur Johansen, Martin Højgaard, Jógvan Atli Johansen, Snorri Petersen, Jóhan Magnus Johannessen og Kristian Johannesen. Hesi fingu virðisløn: 1. Jóhan Magnus Johannessen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. 2. Jóhan Kallsoy, kikara frá Trygd. 3. Birni Dahl Ljósstein, lummaur frá Antares*

# 18 maskinistar fingu prógv

**Tekstur:** Ingolf S. Olsen – PRESS
**Myndir:** Maria Lava Jacobsen

12. mars var prógvhandan á Vinnuháskúlanum. Hesa ferð vóru tað 18 maskinistar, sum vóru lidnir.

Sum altíð var hátíðarrómur í Skálanum á Vinnuháskúlanum. Símun Poulsen, stjóri, bjóðaði vælkomin og helt eina røðu. Síðan var Nánd sungin sum felagssangur, og gestasangarin Jens Marni Hansen undirhelt eina løtu við sínum góða tónleiki og sangi, áðrenn prógvini vórðu handað. Síðani var orðið frítt.

Sum siðvenja er, varð sjálvt hátíðarhaldið endað við, at øll í felag sungu tjóðsangin, men aftaná bar til at práta og hugna sær við einum kaffimunni í Skálanum.

*Jens Marni Hansen undirhelt við tónleiki og sangi*





*Símun Poulsen, stjóri á Vinnuháskúlanum, beyð vælkomin og segði nøkur orð*



*Eisini Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, segði nøkur orð*

# Maskinistarnir vóru fyrstir

## Maskinmeistarafelagið fyllir 80 í ár, og í síni røðu til prógvhandanina, vísti Ólavur Gunnarsson, felagsformaður, á, at tað vóru maskinstar, sum stovnaðu felagið

**Tekstur:** Ingolf S. Olsen – PRESS
**Mynd:** Maria Lava Jacobsen

Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, tók, sum siður er, eisini orðið til prógvhandanina hjá maskinistunum 12. mars.

Hann umrøddi nógvu og fjølbroyttu arbeiðsmøguleikarnar, sum nýklaktu maskinistarnir kunnu velja ímillum, og hann nýtti eisini høvið at hyggja eitt sindur aftur á slóðina hjá felagnum, sum fyllir 80 ár í ár. Her vísti formaðurin á, at Maskinmeistarafelagið upprunaliga var eitt maskinistfelag, stovnað av maskinistum undir navninum Føroya Maskinistfelag.

Ólavur Gunnarsson greiddi soleiðis frá:

”Tað var tann 29. apríl í 1941, at 25 menn – tað vóru bara menn – settu sær stevnu í Avhaldshúsinum í Havn við tí fyri eyga at seta á stovn eitt “felag fyri maskinistar”, sum tað æt. Í fyrstu nevndini sótu Carl Samuelsen úr Havn, Johan Jacobsen úr Vestmanna, Hjalmar Jacobsen úr Klaksvík, Edward Skaalum úr Vági og Peter Lindberg úr Havn.



*Í síni røðu vísti Ólavur Gunnarsson millum annað á, at tað vóru maskinistar, sum fyri 80 árum síðani stovnaðu Føroya Maskinistfelag, sum í dag er Maskinmeistarafelagið*

Lagt var til brots við arbeiðnum beinanvegin, og fyrsta uppgávan var at fáa sáttmála í lag við Felagið fyri føroyskar Trolaraeigarar. Samráðingarnar byrjaðu 2. august sama árið, og 14. august bleiv semja gjørd á fundi í Kollafirði. Semjan hevði við sær, at fyrstimeistarin skuldi fáa 500 krónur um mánaðin pluss tvey prosent av søluni oman fyri 2.000 pund (gjaldoyra, sterlingpund, blðm.) og fýra prosent av søluni oman fyri 3.000 pund. Og annarmeistarin skuldi fáa 350 krónur um mánaðin pluss 1,5 prosent av søluni oman fyri 2.000 pund og 2,5 prosent av søluni oman fyri 3.000 pund.

Hettar var so byrjanin hjá felagnum, sum nú eitur Maskinmeistarafelagið, at tryggja limum sínum so góð kor sum til ber.”

Og júst hetta við tí fyrsta sáttmálanum nýtti Ólavur Gunnarsson til at minna á, hvat kjarnuuppgávan hjá einum fakfelag er.

”Nú tit standa á gáttini til eitt nýtt kapittul í arbeiðslívinum, vil eg heita á tykkum um altíð at hava fakfelagið við tykkum sum ein náttúrligan part. Einki er komið av sær sjálvum, og liggja tað stór stríð liggja aftan fyri øll vunnin rættindi. Og um ongin er at taka stríðini og røkja uppgávuna, so kann tað skjótt ganga aftur eftir hæli”, segði hann.

# Greinakapping – takið pennin



Maskinmeistarafelagið fyllir 80 ár í ár, og í tí sambandinum hava vit eina greinakapping ímillum limir felagsins.

Ætlanin var, at fyrsta íkastið skuldi vera í hesum blaðnum, men undirtøkan higartil hevur verið ov løk til, at tað bar til.

Men kappingin er opin, og vónandi hevur onkur hug at skriva.

Tvey bløð koma út afturat í ár, og ætlanin er at hava eina kapping í hvørjum blaði, so tað er bara at halda seg til.

Fyri hvørja kapping verður 1., 2. og 3. virðisløn latin, og verða tær upp á ávikavist upp á 2.000, 1.000 og 500 krónur.

Vinnaragreinin verður prentað í Maskinmeistaranum og løgd á heimasíðuna, og nummar 2 og 3 verða eisini lagdar á heimasíðuna – og møguliga brúktar í blaðnum seinni, um tær hóska, í samráð við innsendaran.

Allar innsendar greinar eru meira enn vælkomnar, sama um tær eru kandidatar til virðisløn ella ikki, tí øll íkast kunnu heilt vist tæna sum íblástur til greinar, sum blaðredaksjónin kann arbeiða víðari við.

Einastu treytirnar fyri, at greinar verða góðkendar til kappingina, er, at tær onkursvegna snúgva seg um maskinmeistarafakið, serligar søgur um maskinur og maskinfólk, ella skrivað verður um fakfelagsviðurskifti í sambandi við maskinmeistarafakið. Vítt er til veggja, men greinarnar skulu tó ikki vera kjakgreinar í lesarabrævstíli.

Myndir skulu eisini vera til greinarnar, best er, um greinskrivarin sjálvur hevur góða mynd ella myndir at senda við, men eigur hann onga, hjálpa vit til við hesum.

Felagið tilskilar sær rættin at rættlesa og redigera greinarnar, so tær eru málsliga og faktuelt í lagi. Hesum tekur blaðredaksjónin á Maskinmeistaranum sær av. Liðugt redigeraða greinin verður síðani send aftur til innsendaran til góðkenningar.

Evstamark til fyrstu kappingina til næsta blað er 16. August. Ætlandi kemur tað blaðið út í september. Til seinasta blaðið, sum kemur út út ímóti jólum, er evstamark 29. november.

Greinar til kappingina skulu sendast til mf@mf.fo ella press@press.fo

# Formaðurin ávarar ímóti privatisering av SEV

**Tað kann vera vandasjógvur at sigla fyri alt tað føroyska samfelagið, um stórkapitalurin sleppur at seta seg heilt ella bara partvíst á elframleiðsluna og elkervið. Tað lat Ólavur Gunnarsson ongan iva vera um í síni formansrøðu**



*– Trúgv mær, stórkapitalurin fer bert inn í eina slíka tilgongd við einum fyri eyga, nevniliga at tjena skjótar pengar*

**Tekstur og mynd:**
Ingolf S. Olsen – PRESS

Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, brúkti fitt av tíð upp á SEV í síni umrøðu av kommunala sáttmálaøkinum á aðalfundinum í vár, og hann duldi ikki, at politiska ætlanin hjá samgonguni um at privatisera partar av SEV bæði hevur vakt undran og ørkymlan.

Í síni formansrøðu segði hann soleiðis um tær ætlanirnar og møguligar avleiðingar:

"Mín meining er, at her skulu vit vera sera varin, tí talan er um eina av týdningarmiklastu grundfunksjónunum í samfelagnum, sum myndugleikarnir sleppa teymarnar á, verða tær privatiseraðar. Um vit vóru eitt land á evropeiska meginlandinum, har møguleikarnir at fáa fatur á orkuni vóru fleiri, lat so fara, men í okkara isoleraða oyggjasamfelag, har vit í stóran mun bara hava júst ta orku, sum brúk er fyri, kann tað verða sera vandamikið. Trúgv mær, stórkapitalurin fer bert inn í eina slíka tilgongd við einum fyri eyga, nevniliga at tjena skjótar pengar, og um tað ikki eydnast – ella tá seinastu oyruni eru vundin úr øllum elkervinum, og tað er slitið niður í legg – so taka teir seg aftur. Tá er tað bara ein, sum kann og verður noyddur at taka um endan fyri at halda framleiðsluni í gongd, nevniliga tað almenna, sum helst framhaldandi fer at hava veitingarskylduna.

Eitt annað, sum er viðkomandi at taka upp í hesum høpi, er júst veitingarskyldan. Tí um so er, at hon framhaldandi skal liggja hjá SEV, so má SEV eisini hava ræðisrættin á nóg mikið av framleiðslueindum til at kunna tryggja øllum tann streym, sum brúk er fyri til eina og hvørja tíð. Hettar vil, sama hvussu er við restini, kunna elva til, at tað verður ein ógvusliga stórur yvirkapasitetur á orkusíðuni, og tá man tað fara at vera teir privatu framleiðararnir, sum skulu hava forrætt at sleppa av við sína framleiðslu og fáa gjald fyri hana, ímeðan tann almenni parturin – framleiðslan hjá SEV – fer at standa sum "back-up" uttan at fáa eitt klovið oyra yvirhøvur. Hettar kann væl ikki verða meiningin, ella hvussu?

Um tað almenna ikki skal stýra framleiðsluni, men hendan í staðin verður latin upp í hendurnar á privatum fyritøkum at tjena skjótar pengar upp á, er vandi fyri, at tað almenna kortini í seinasta enda verður noytt at taka yvir aftur eina røð av útasaðum framleiðslueindum umframt kostnaðarmiklu uppgávuna at fáa alt á beint aftur.

Vit hava í løtuni góðar fyritreytir at halda viðlíkahaldstøðið á øllum teimum framleiðslueindunum, sum veita streym til okkum. Grundin til, at eg kann siga tað, er, at eg veit, hvør tað er, sum skal loysa uppgávurnar, nevniliga í fyrsta lagi maskinmeistarar, sum eru sera væl brynjaðir til hesa uppgávuna.

Við einari privatisering er vandi fyri at viðlíkahaldsuppgávan fer til tann, sum kann gera hana bíligast, kanska útlendingar, og tá er vandi fyri, at vit missa tamarhaldið á tí frálíka viðlíkahaldstøði, sum SEV við sínum sera vælkvalifiseraðu føroysku maskinmeistarum hevur staðið fyri.

Eg vóni, at vit í viðgerðini av hesum sera týdningarmikla máli finna ta skilabestu og mest langtíðarhaldføru loysnina, øllum føroyingum at frama."

*Í løtuni er Sundsverkið ikki knýtt í fjarhitaskipanina í Havn, men útbyggingin fer fram nú, og tá fer meginparturin av hitanum at koma frá Sundsverkinum*



# Sundsverkið kann føða alt meginøkið

**Sundsverkið er størsta arbeiðsplássið hjá maskinmeistarum á landi. Flestu maskinmeistarnir hava siglt úti, áðrenn teir eru byrjaðir á Sundsverkinum, men arbeiðið minnir um at sigla, sigur Guttorm Joensen, sum er maskinmeistari. Nýggju motorarnir á Sundi hava økt samlaða máttin hjá verkinum úr 45 MW upp í 82 MW. Vanliga nýslan um summarið er umleið 50 MW**

**Tekstur og myndir:**
Øssur Winthereig - PRESS

Skorsteinarir á Sundi við Kaldbaksfjørð stinga seg høgt upp og boða frá, at her verður okkurt brent. Og tað er tungolja, sum verður gjørd til streym.

Summar dagar er lív í øllum skorsteinunum, og streymurin av Sundsverkinum fer í hvønn krók í landinum norðan fyri Suðuroyarfjørð.

Aðrar dagar koyrir Sundsverkið bara við hálvari megi ella minni, tí streymurin kemur frá vindmyllunum ella vatni.

Nýggja verkið hevur reinsiskipan at reinska knoxini, áðrenn roykurin fer upp gjøgnum skorsteinin. Nýggja verkið endurnýtir eisini dampin – eitt nú til at hita tungoljuna, áðrenn hon skal brennast í motorunum.

Sundsverkið er størsta arbeiðsplássið hjá maskinmeistarum í Føroyum. Yvir 30 maskinmeistarar arbeiða fast á Sundsverkinum.

Guttorm Joensen hevur í tveimum umførum arbeitt á Sundsverkinum.

Í dag hevur Guttorm vakt í kontrollrúminum, men hevur fingið ein at taka eina løtu fyri seg, meðan eg vitji.

Teir eru altíð tveir maskinmeistarar á vakt í kontrollrúminum. Ein skal altíð vera í rúminum, so annar kann fara út um at orna okkurt.

Vaktarskipanin er soleiðis, at teir ganga turnus, so bæði arbeiðstíð og arbeiðsuppgávur skifta. Ein byrjar eina viku at hava náttarvakt, so eina kvøldvakt og so aftur náttarvakt, so morgunvakt og so frí í eina viku. So fer sami maður úr vaktini og arbeiðir átta til fýra og er í viðlíkahaldinum. Vaktartalvan er eisini løgd soleiðis, at allir koma sum frá líður at arbeiða saman í kontrollrúminum.

### Gott útsýni

Kontrollrúmið liggur út móti Kaldbaksfirði, og sjálvt um skíggjar og onnur útgerð minnir nógv um eitt kontrollrúm umborð á einum skipi, so stendur Kaldbakslandið norðanfyri í stað.

Sundsverkið er býtt í tríggjar støðir. Støð 1 og støð 2 eru teir gomlu motorarnir, og støð 3 er teir fýra nýggju motorarnir.  Støð 1 var liðug í 1974 og støð 2 í 1983. Støð 3 varð tikin í nýtslu í 2020.

Nýggju motorarnir á Sundsverkinum eru MAN-motorar, sum er lagaðir til, hvussu teir skulu koyra. Teir elstu eru eisini MAN.

Áðrenn støð 3 var sett til, kundi verkið framleiða 45 MW, og støð 3 hevur lagt 37 MW omaná, so samlaði mátturin er 82 MW.  Harafturat er eitt 8 MW tiltaksverk.

Á einum av skíggjunum sæst, at samlaða nýtslan norðan fyri Suðuroyarfjørð í dag er 48 MW. Av teimum vera 37 MW framleidd í motorunum á verkinum. Restin kemur fra vindi og vatni – 11 MW.

- Hetta er ikki ein góður dagar. Tá eg sigi góður dagur, meini eg ein dag, har lítið kemur frá Sundsverkinum. Onkuntíð er tað á leið 50 prosent. Men hetta í dag er nokk so vanligt um summarið, sigur Guttorm Joensen.

### 100 MW tryggur máttur

Eftirspurningurin eftir elorku í meginøkinum vanligar dagar liggur millum 50 og 55 MW, og hægsti tørvur á elorku nakrantíð er skrásettur til 62 MW – tað var í november 2019.

Í meginøkinum hevur SEV aðrar dieselmotorar við einum samlaðum mátti upp á góð 17 MW, harav 11 MW



*Guttorm Joensen stendur við skíggjan í kontrollrúminum, sum vísir, at seks motorar eru í gongd í dag. Guttorm Joensen hevur arbeitt á Sundsverkinum í góð átta ár*



*Teir eru tveir á vakt í kontrollrúminum, og ein skal altíð verða í rúminum*



*Elsti motorurin er frá 1983 og næstelsti er frá 1988, og báðir koyra enn. Teir eru 12 MW hvør*



*Dampketilin, har roykurin hitar dampin, sum síðani hitar tungoljuna*



*Fløskur klárar, um eldur kemur í eltalvurnar, sum ikki tola vatn*



*Sundsverkið brennir tungolju, og í goymlsuni er olja til einar tveir-tríggjar mánaðar, veldst um nýtsluna*

eru tiltaksmotorar í bingjum, sum kunna flytast eftir tørvi. Sostatt hevur SEV ein samlaðan tryggan motormátt upp á 100 MW í meginøkinum.

Umframt framleiðsluna á Sundi og á hinum verkunum, ið brúka olju, kemur sveiggjandi mátturin, sum er vatnorkan og vindorkan, ið eru tengd at veðrinum. Vatnorkuverkini hava ein samlaðan mátt upp á 37 MW, og vindmyllurnar hava ein mátt upp á 18 MW. Saman við trygga máttinum upp á 100 MW er talan um ein framleiðslumátt í meginøkinum upp á tilsamans 155 MW.

Sjálvandi sæst væl um summarið, at tað eru hvørki vatn ella vindur, so tá kemur meginparturin frá verkinum á Sundi.

– Summi halda, at jólaaftan er nógv nýtsla, tá dunnurnar standa í ovninum, men so er ikki. Tá koyra eingi virki, og tað eru virkini, sum gera tann stóra munin, sigur Guttorm Joensen.

Sundsverkið kann, sum er, føða alt meginøkið við streymi.

– Vit eru noyddir til at kunna klára 100 prosent við olju, tí tað eru løtur, har eingin annar streymur er. Um tað bara er nakrar fáar dagar um árið, so mugu vit hava nokk til 100 prosent,

– Haldi eg minnist eina ella tvær ferðir, har Sundsverkið hevur føtt alt meginøkið, sigur Guttorm Joensen.

– Ja, hetta er eitt stórt verk, men verkið dálkar ikki, tá tað ikki koyrir.

Tað er ikki bara um summarið, at tað kann svíkja við vindi og vatni. Tað er meiri enn so komið fyri í januar, at eingin vindur er, og kavi hevur ligið, tá kann støðan vera tann sama sum mitt um summarið.

### 100 alarmar á eini vakt

DYYTTTT, ljóðar beint við síðuna av, og mennirnir hyggja róliga upp.

Guttorm trýstir á ein knøtt, og alarmurin sløknar aftur.

– Jú hetta minnir um at sigla, her eru nógvir alarmar.

*Hvussu nógvir alarmar fara í gongd til dømis á eini vakt?*

Guttormur smílur og er kanska eitt sindur trekur at svara:

– Tja, hvat skal eg siga. Júmen tað er ikki altíð, at alarmarnir hava so nógv upp á seg..... kanska einir 100 alarmar ein ringan dag gjøgnum eina 12 tímars vakt.

– Onkuntíð eru tað bara onkrar pinkulítlar justeringar, men man er noyddur at taka hvønn alarm í álvara, tí tað kann vera okkurt álvarsamt.

– Ringt at siga, hvat hevur størstan týdning at fylgja við í, tá man situr í kortrollrúminum. Ja, til dømis kann

ein alarmur vísa, at um ikki okkurt verður gjørt skjótt, so slóknar ein motorur. Kanska oljutrýstið lækkar, ella onkur temperaturur fer ov høgt upp. Allir motorar hava ymisk sløg av verju – eisini fyri at verja motorin sjálvan, sigur Guttorm Joensen.

– Har er eitt kompromis millum teir, sum hava gjørt motorarnar og okkum, sum skulu brúka teir. Teir vilja heldur hava motorarnir at slókna í fyrra lagi, so einki hendir við mortorinum, og onkuntíð halda vit kanska, at teir ikki skulu slókna so skjótt. Ofta er tað eitt vanligt prát millum teir, sum levera ein nýggjan motor: hvussu skjótt skal hann steðga, greiður Guttorm Joensen frá.

Á einum øðrum skíggja sæst yvirlit yvir motorarnar – í dag eru seks motorar reyðir, og tað eru teir, sum koyra. Tveir standa stillir, og so eru tveir smáir dieselmotorar, sum mest vera brúktir í neyðstøðum, ella um startast skal upp í bráskundi.

– Vit koyra ikki fleiri motorar inn, enn tað er brúk fyri. Men teir, sum koyra, koyra ikki 100 prosent, tí um ein motorur dettur út, so hava hinir nóg mikið av megi til at taka yvir beinanvegin.

– Hesir seks motorarnir, sum nú koyra, hava 19 MW eftir upp til fult.

– Tað er alla tíðina ein vurdering, hvussu nógva megi hvør motorur skal koyra uppá – tað skal vera trygt, og tað skal heslt eisini vera økonomiskt, sigur Guttorm Joensen.

Teir smáu dieselmotorarnir kunnu brúkast, um tveir motorar detta út, og líka halda tað gangandi, meðan onkur annar av teimum stóru motorunum verður settur í gongd.

## Eyka máttur á virkjunum

Øll tey stóru virkini, eitt nú smoltstøðirnar og frystigoymslurnar, kunnu koyra sjálv, um tað gerst neyðugt. Landssjúkrahúsið er eisini ein av stóru brúkarunum, sum hevur egið verk, sum kann sláast til.



*Í nýggju høllini eru fýra MAN-motorar, hvør upp á góð 9 MW*



*Skorsteinurin í nýggja verkinum stendur leysur mitt á bygninginum og býtur bygningin upp, so tað eru tveir motorar hvørju megin*

– Allir eykamotorarnir, sum standa á virkjum og stórum arbeiðsplássum ella stovnum, koyra bara upp á diesel, so tá SEV framleiðir streym úr vindi og vatni, so vera virkini eisini grønari á tann hátt, sigur Guttorm Joensen.

Um alt er undir kontroll, og ein motorur skal startast upp, so tekur tað einar 15 minuttir. Men um allur streymurin er farin, og 100 ymiskir alarmar blinka og larma, tá tekur tað longri tíð at starta ein motor upp.

## Eftirspurt arbeiðspláss

– Eg haldi, at flestu maskinmeistarar, sum koma í land, hava hug at arbeiða her, sigur Guttorm Joensen.

– Umborð á einum skipi eru sjálvandi færri fólk, so tað verður ofta arbeitt í kontrollrúminum og viðlíkahaldi hvørt um annað, men arbeiðið minnir nógv um tað, sum er umborð á einum skipi.

– Siglir tú við Maersk, so eru motornar størri enn hesir, men siglir tú við




ROYN TÍNA VITAN Í VERULEIKA-KENDUM UMSTØÐUM

# TAK SKEIÐINI TÁ TÚ ERT HEIMA

## Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

### VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ECDIS-skeið
- GOC-skeið
- DP-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- SSO-skeið
- ERM-skeið
- Tecdis-skeið
- Heilsu-skeið
- ARPA-skeið
- Trygdar-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á **www.skeid.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

SENDISTOVAN



fiskiskipi ella supply, so eru hesir størri, sigur Guttorm Joensen,

– Nógvir av teimum, sum arbeiða á Sundsverkinum, hava siglt. Teir, sum hava chief-pappír missa tey, tá teir koma á Sundsverkið, men kunnu varðveita fyrstameistarapappírini.

– So tað er lætt hjá mær at fara út aftur at sigla. Skal bara hava trygdareskeið, sigur Guttorm, sum tó ikki ætlar sær avstað aftur fyribils.

## Teir stoltu gomlu motorarnir

Úr kontrollrúminum á støð 1 fara vit inn í høllina, har teir gomlu motorarnir standa. Tann elsti er frá 1983 og hin frá 1988. Teir eru ein stoltleiki fyri verkið.

Tað er næstan soleiðis, at nú eru tað vit, sum ikki mugu larma ov illa, tí vit skulu vísa hesum prúðu gomlu MAN-motorunum virðing.

– Eg haldi, at tað er onga aðrastaðni, at motorar av hesum slagnum koyra. Teir plaga at siga, at ein motorur av hasum slagnum kann koyra 150.000 tímar, men hesin hevur koyrt meira enn 200.000 tímar. Hann skuldi langt síðani verið pensioneraður. Hesir gomlu motorarnir hava lægsta prioritet, men teir roynast øgiliga væl.

– Men tað er eisini trupult at fáa eykalutir til teir. Vit mugu fáa spesialgjørdar deilir, og tá er leveringstíðin altíð long, sigur Guttorm Joensen.

Sjálvt fyri ein óroyndan journalist síggja hesir báðir motorarnir gamlir út.

Guttorm peikar upp á ventilarnir, sum eru fjarðaventilar.

– Eg ivist í, um tú sært hatta slagið av ventilum nakra aðrastaðni í verðini. Nú eru allir ventilar luftstýrdir, sigur Guttorm og lovar mær upp á motorin at taka nærmynd av fjarðaventilinum.



Teir báðir gomlu motorarnir eru 12 MW. Teir fýra nýggju motorarnir í nýggju høllini eru nakað minni, góð 9 MW hvør. Við fleiri smærri motorum verður verkið meira fleksibult.

– Kanska er tað meira økonomiskt at hava stórar motorar, men hinvegin, dettur ein út, so skal meira til. Tá hevur man heldur valt at hava fleiri minni, sigur Guttorm Joensen.

**Knýtast í fjarhita**
Nú er eitt ár síðan, nýggja verkið var tikið í nýtslu. Útbyggingin, sum nú er í gongd, er at nýta avlopshitan til fjarhitaskipanina í Havn. Gamla verkið var knýtt í fjarhitaskipanina, men var tikið frá, tá nýggju motorarnir vórðu settir upp. Í løtuni er tað bert hiti frá Brennistøðini, sum fer inn á fjarhitaskipanina í Havn, men tá avlopshitin frá nýggja verkinum verður knýttur í, verður meginparturin frá Sundsverkinum.

– Men tað krevur, at verkið koyrir, annars verður tað ikki nógv. Eg havi skilt, at man umhugsar at seta ein elketil upp, sum eisini kann taka ímóti yvirskotsstreymi frá vindmyllunum, og sum kann føða fjarhitan, sigur Guttorm Joensen.

Sundsverkið koyrir upp á tungolju, og tað krevst nógv viðgerð av tungolju, áðrenn hon kann brennast i motorunum. Hon skal reinskast og hitast upp, áðrenn hon rennur inn í motorarnar.

Hevði verkið koyrt upp á vanligt diesel, so slapst undan eitt nú útgerð at hita olju upp og reinska hana, áðrenn hon kundi brennast.

– Men samlaða roknstykkið visir, at prísmunurin millum tungolju og diesel er so mikið stórur, at tað loysir seg at hava ta eykaútgerð, sum krevst fyri at kunna brúka tungoljuna, sigur Guttorm Joensen.

**Streymurin er farin**
Største avbjóðingin er at halda streymin koyrandi.

SEV sigur sjálvt, at uppgávan hjá Sundsverkinum er at veita streym, tá grøn orka ikki er tøk. Tað er í summarmánaðunum, tá hvørki vindur ella





***Fjarðaventilar eru sjáldsamir nú á døgum, men teir rigga fínt***

vatnorka eru tøk. Tá er tað enn brúk fyri svartari orku ella orkuni, sum verður framleidd á verkunum.

Men tað hendir meiri enn so, at streymurin fer í meginøkinum.

Í høvuðsbygninginum hjá SEV við Landavegin í Havn er eitt annað kontrollrúm, sum samskipar alt netið kring landið.

Í kontrollrúminum á Landsvegnum royna tey at fáa skil á netið, tá streymurin fer, og biðja so um at fáa eindir innaftur. Tá skulu vit royna at starta motornar upp, so skjótt sum til ber. Ofta starta vit motorarnar, so teir eru klárir, og leggja teir inn á netið aftur, tá boð koma frá kontrollrúminum við Landavegin.

Um motorarnir steðga, so kann tungoljan kølna, so tekur tað longri tíð at starta uppaftur.

Tá streymurin fer, so missa vit eisini streymin, so fyrsti prioritetur hjá okkum er at starta okkara generator, so vit fáa pumpur og annað í gongd, so skjótt sum til ber.

– Tá eg arbeiddi á Avedøreverkinum í Danmark, so hendi tað ofta, at verkið datt út, men danskararnir merktu einki, tí har er netið knýtt til Svøríkis og Týsklands. Men tá vit detta út, so merkja øll í meginøkinum tað beinanvegin, sigur Guttorm Joensen.

– Ein kortslutningur í Klaksvík kann gera, at ein motorur dettur út, og so hendir ofta eitt slag av dominoeffekt, tí hinir motorarnir klára ikki beinanvegin at taka yvir og detta kanska eisini út.

– Grundirnar til, at streymrin fer, kunnu vera so nógvar. Vanliga hevur verið hugsað, at streymurin fer, tá tað er ringt veður, tí leidningar kasta saman ella okkurt líknandi, men tað er ikki longur mest vanliga orsøkin til streymslit, sigur Guttorm Joensen.

– Orsøkin er fyri tað mesta, at so nógv virksemi er í gongd. Onkuntíð vera kanska stórir káplar settir til í einum tunli, sum kann fáa ávirkan á samlaða máttin.

– Tey, sum sita í kontrollrúminum við Landavegin, fylgja við, um onkrir stórir brúkarar eru á veg inn á netið. Tey




***Býtið í framleiðsluni 1. juni 2021***

fylgja við veðrinum – hvussu verður við vindinum og regninum – og tey fylgja eisini við, tá til dømis eitt stórt skip fer inn á Kollafjørð. So vita vit, at frystigoymslurnar vera settar til, og vit kunnu vera til reiðar at økja máttin.

**Trívist væl heima**

– Jú, hetta minnir um at vera umborð á einum skipi. Tú skalt hava motorarnar koyrandi, tú skalt hava eina viðlíkahaldsskipan og fylgja við, hvussu motorarnir koyra. Og motorarnir koyra alla tíðina, og tað gera teir eisini umborð á einum skipi.

– Eg byrjaði sum aspirantur hjá Maersk og havi siglt við Maersk. Eg havi eisini arbeitt á einum orkuverki í Danmark – Avedøreverkinum. Tá eg flutti heim, byrjaði eg her á verkinum, men var í farloyvi og sigldi hjá Skansa í góð fýra ár, og fyri fýra árum síðani kom eg aftur her.

– Eg fór avstað aftur, tí eg helt, eg var ikki ordiliga liðugur at sigla, men so bleiv eg liðugur. Nú vildi eg gjarna vera heima, sigur Guttorm.

Men Guttorm dugur væl at síggja, at summir trívast væl umborð og vera burtur og skoytir skemtandi uppí, at kanska trívist konan ofta eisini væl við tann lívsháttin.

– Tað dróg eisini í meg at vera úti og sigla, og eg gleddi meg øgiliga nógv at koma heim, men haldi ikki, eg fekk nóg nógv burturúr at vera heima. Onkuntíð kendi eg meg eitt sindur einsamallan, tí eg vildi kanska vera sosialur, men hini høvdu síni arbeiði. Ja, hevði næstan ov nógva frítíð. Man kundi heldur ikki vera við í so nógvum. Eg plagdi at vera við í sangkóri, men so var man burtur, tá konsertirnar vóru. Føldi eitt sindur, at hini kundu ikki ordliga rokna við mær, sigur Guttorm Joensen.

– Onki at ivast í, at hetta verkið er ein tann størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara, sum vil arbeiða á landi. Hetta er eitt stórt anlegg, og tú kemur út fyri nógvum.

– Men, eg haldi, eg vil mæla øllum til at sigla nøkur ár, áðrenn teir koma her. Tað eru heldur ikki nógvir, sum koma beinleiðis her. Man fær nakrar aðrar royndir og kanska víðkað sjónarringin eitt sindur, tá man siglur úti, sigur Guttorm Joensen.



*Kølivatnsmodulið á einum av nýggju MAN-motorunum*

## Motorarnir á Sundsverkinum

| Navn | Úrslitið í MW | Uppsett ár | Brennievni | Verksmiðja | Motorslag | Generator |
|---|---|---|---|---|---|---|
| M1 | 8.100 | 2001 | Heavy fuel | Caterpillar Mak | 9CM43 | A. van Kaick |
| M2 | 8.100 | 2003 | Heavy fuel | Caterpillar Mak | 9CM43 | A. van Kaick |
| M3a | 2.400 | 2015 | Dieselolja | MTU | 20 V 4000 G63L | Marelli |
| M3b | 2.400 | 2015 | Dieselolja | MTU | 20 V 4000 G63L | Marelli |
| M4 | 12.400 | 1983 | Heavy fuel | MAN B&W | 12 L55 GSCA | Jeumont-Schneider |
| M5 | 12.400 | 1988 | Heavy fuel | MAN B&W | 12 L55 GSCA | Jeumont-Schneider |
| M6 | 9.300 | 2019 | Heavy fuel | MAN | 9L51/60 | Indar |
| M7 | 9.300 | 2019 | Heavy fuel | MAN | 9L51/60 | Indar |
| M8 | 9.300 | 2019 | Heavy fuel | MAN | 9L51/60 | Indar |
| M9 | 9.300 | 2019 | Heavy fuel | MAN | 9L51/60 | Indar |

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**4. mars 2021**
Fundur við Jacob Vestergaard um ymisk viðurskifti í fiskiflotanum.

**5. mars 2021**
Nevndarfundur. Á skránni vóru fimm mál til støðuytakan umframt kunning um sjey viðurskifti. Hetta var samstundis seinasti nevndarfundurin áðrenn aðalfundin.

**5. mars 2021**
Fundur við KAF um setanarviðurskifti hjá limi.

**11. mars 2021**
Fundur við umboð fyri Sókn-advokatar viðvíkjandi ymiskum, sum relateraði til aðalfundin.

**12. mars 2021**
Prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har 18 maskinistar fingu handað prógv.

**12. mars 2021**
Fundur í Sjóvinnuráðnum, har kæran um Jákup Sverra varð viðgjørd.

**13. mars 2021**
Aðalfundur felagsins á Hotel Hilton.

**16. mars 2021**
Fundur við BankNordik um røkt av innlánspeningi.

**16. mars 2021**
Fundur í Fíggjarmálaráðnum um hækking av fráfaringaraldrinum hjá tænastumonnum.

**19. mars 2021**
Nevndarfundur, har nevndin skipaði seg við næstformanni og málsøkjabýti. Á skránni vóru haraftrat 11 mál til støðutakan og kunning um 10 onnur viðurskifti.

**23. mars 2021**
Hoyringsfundur í Vinnunevndini um broyting í lógunum um el-útbúnað og góðkenning av el-innleggjarum.

**23. mars 2021**
Fundur við hini manningarfeløgini um møguligt gerðarrættarmál. Við á fundinum var umboð fyri Sókn-advokatar. Fundurin varð hildin í hølunum hjá Føroya Fiskimannafelag.

**24. mars 2021**
Fundur um induviduella ognarrøkt í BankNordik.

**25. mars 2021**
Fundur við KAF um flokking av starvi

**26. mars 2021**
Fundur í Maretima útbúgvingarráðnum. Fundurin varð hildin á Vinnuháskúlanum.

**31. mars 2021**
Fundur við limir hjá okkum, sum eru settir í Sjóvinnustýrinum.

**8. apríl 2021**
Eyka stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**9. apríl 2021**
Fundur við lim hjá okkum, settur á Bakkafrost.

**12. apríl 2021**
Fundur í NMF. Hesaferð var talan um virtuellan fund á Teams.

**13. apríl 2021**
Aðalfundur í P/F Fakfelag. Fundurin varð hildin í Smæruni.

**14. apríl 2021**
Vitjan á Bakkafrosti við rundvísing. Ymisk viðurskifti vóru á skrá.

**16. apríl 2021**
Hoyringsfundur í Fíggjarnevndini um nýggju veiðutølini.

**16. apríl 2021**
Fundur við hini manningarfeløgini um ymisk sáttmálaviðurskifti í fiskiflotanum.

**23. apríl 2021**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**28. apríl 2021**
Fundur við umboð fyri Trygd um ymisk møgulig tryggingartilboð til limir.

**29. apríl 2021**
Nevndarfundur. Á skránni vóru sjey ál til støðutakan umframt kunning um sjey onnur mál.

**4. mai 2021**
Virkisvitjan á Smoltstøðini á Strond, sum Bakkafrost eigur. Umframt rundvísing vóru ymisk viðkomandi viðurskifti umrødd.

**7. mai 2021**
Arbeiðsdagur í Trygdargrunninum, har ymisk viðkomandi evni vórðu tikin fram og umrødd. Dagurin varð hildin á Hotel Føroyum.

**11. mai 2021**
Á vitjan hjá reiðarínum, Navigare, sum nú er staðsett í Søldarfirði. Umrødd vórðu ymisk viðkomandi viðurskifti.

**20. mai 2021**
Nevndarfundur í FMU.

**28. mai 2021**
Nevndarfundur. Á skránni vóru fimm mál til støðutakan umframt kunning um átta onnur viðurskifti.



# FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið

| **Navn** | **Føðingardagur** | **Bygd/býur** | **Aldur** |
|---|---|---|---|
| Jens Olav T. Jensen | 10/4-1951 | Froðba | 70 ár |
| Niels Jacob Olsen | 15/4-1951 | Argir | 70 ár |
| Gunnar Rubeksen | 22/4-1951 | Tórshavn | 70 ár |
| Jósvein Jacobsen | 27/4-1951 | Strendur | 70 ár |
| Øssur T. Simonsen | 21/5-1951 | Tórshavn | 70 ár |
| Ásmund Lassen | 24/5-1951 | Klaksvík | 70 ár |
| Jógvan M. Garð | 18/6-1951 | Esbjerg | 70 ár |
| Sjúrður Christiansen | 7/7-1951 | Skáli | 70 ár |
| Almfinn Jacobsen | 7/7-1951 | Skálafirði | 70 ár |
| Sigurd Suni Poulsen | 26/4-1961 | Fuglafjørður | 60 ár |
| Jan Dahl Sørensen | 3/5-1961 | Norðdepli | 60 ár |
| Rógvi Thomsen | 12/6-1961 | Tórshavn | 60 ár |
| Eyðfinn J. Mellemgaard | 19/6-1961 | Klaksvík | 60 ár |
| Eyðbjørn Clementsen | 17/7-1961 | Sandur | 60 ár |
| Jens Tummas Næs | 2/7-1971 | Sandavágu | 50 ár |
| Árni Østerø | 22/7-1971 | Klaksvík | 50 ár |
| Esbern Lervig | 11/4-1981 | Saltangará | 40 ár |
| Niels Holm Biskopstø | 18/4-1981 | Klaksvík | 40 ár |
| Poul Henning Jacobsen | 5/5-1981 | Syðrugøta | 40 ár |
| Kenneth Gaardlykke | 8/5-1981 | Miðvágur | 40 ár |
| Jóan Petur Brandal | 12/5-1981 | Klaksvík | 40 ár |
| Remi Johansen | 3/6-1981 | Miðvágur | 40 ár |
| Aron Olsen | 7/7-1981 | Norðragøta | 40 ár |
| Johannes Petersen | 25/5-1991 | Hov | 30 ár |
| Per Langgaard | 30/5-1991 | Glyvrar | 30 ár |
| Sámal Johannesen | 1/7-1991 | Søldarfjørður | 30 ár |
| Herbjørn Lava | 18/7-1991 | Tórshavn | 30 ár |



# Eftirløn

Til eitt langt virkið lív, er gott við
eini persónligari uppsparing.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman
títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo